# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi upp í skrið av eystri og landnyrðingi. Skýggjað og támut og regn ein stóran part av tíðini. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi. Skýggjað og támut og regn ein stóran part av tíðini. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, men minkandi út á dagin. Skýggjað við regni ella ælaveðri, serliga fyrrapartin. Hitin umleið 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hann minkar vindin niður í lítið lot av ymsum ættum, turt og skýggjað, og hitin verður umleið 7 stig. Seinni upp í strúk í vindi av suðri og landsynningi, við regni vestaneftir. Hitin økist upp í eini 10 stig.

# Gransking skal takast við fyrivarni

*Hóast nógv áhugaverd granskingarúrslit verða løgd fram á ymsum ráðstevnum, eigur slíkt at takast við fyrivarni, heldur stjórin á Føroya Fiskavirking*

EDVARD JOENSEN

Gransking er góð. Men gransking skal eisini takast við eitt sindur av fyrivarni, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking. Hann er við á ráðstevnuni um gransking, sum verður hildin í Norðurlandahúsinum hesa vikuna.

Meinhard Jacobsen ivast ikki í, at sumt av tí, sum kemur fram við slík høvi, onkusvegna kann brúkast í praksis. Men verri enn so alt, sum lagt verður fram, er praktiskt gjørligt soleiðis beinanveg.

Við hvørt, metir hann, verður granskað mest fyri granskingina skuld. Tí ikki alt, sum granskað verður í, er brúkiligt í praksis. Granskað verður fyri at klárleggja nøkur ávís viðurskifti, sigur hann.

Men hinvegin er eingin ivi í um, at til ber at brúka nógv av tí, granskarar finna fram til, tá tað er viðgjørt og tillagað, sigur stjórin á Føroya Fiskavirking. Verður arbeitt víðari við granskingarúslitunum, kunnu tey so at enda brúkast til onkra heilt konkreta uppgávu, heldur hann.

Meinhard Jacobsen, sigur, at okkurt heilt ávíst á hesi ráðstevnuni er vert hjá Fiskavirking at hyggja nærri at. Meira vil hann ikki siga um tað evnið.

Hann sigur, at hann er ikki farin í Norðurlandahúsið við teirri vón at síggja nakað, hann bara kann taka heim aftur við og brúka í morgin. Ørindini eru heldur at síggja og hoyra, hvat rørist á økinum og hitta fólk og fáa knýtt sambond, sigur stjórin á Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen.

Meinhard Jacobsen leggur tó dent á, at hevði hann ikki væntað at fingið nakað sum helst burtur úr ráðstevnuni, hevði hann slett ikki farið niðan í Norðurlandahúsið hesar dagarnar.



*Hóast gransking kann vera góð og neyðug, eiga vit at taka úrslitini við fyrivarni, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking, sum er á granskingarráðstevnu í Norðurlandahúsinum um dagarnar*

***Mynd: Jens Kristian Vang***

## Millumtjóða ráðstevna

Reiðiliga 100 fólk eru um dagarnar á ráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Hetta eru granskarar, sum luttaka á ráðstevnu hjá WEFTA, sum er vestureuropeiskur granskingarfelagsskapur.

Ásmundur Guðjónsson á Heilsufrøðiligur Starvsstovuni er ein teirra, sum standur fyri ráðstevnuni. Hann sigur, at WEFTA er ein av fýra alheims felagsskapum av hesum slagi. Hinir tríggir eru ein í Norðuramerika, ein í Suðuramerika og ein í Kyrrahavsøkinum.

Hendan ráðstevnan, sum nú er í Føroyum, er ein í eini regluligari røð av ráðstevnum, felagskapurin WEFTA heldur. Heilsufrøðiliga Starvsstovan er við í WEFTA samstarvinum og beyð sær til at vera vertur hesaferð, sigur Ásmundur Guðsjónsson. Og tað fekk so mikið góða undirtøku, at avgjørt varð at hava ráðstevnuna her.

Tað, sum hendir á slíkari ráðstevnu er, sigur Ásmundur Guðsjónsson, at granskararnir leggja fram úrslitini av tí, teir hava gjørt. Tað verður vanliga gjørt í fyrilestrum, sum hildnir verða á slíkum ráðstevnum.

Ásmundur Guðjónsson sigur, at tað kemur altíð okkurt spennandi fram á eini slíkari ráðstevnu. Tað velst sjálvandi um persónin, sum lurtar, sigur hann.

Summir av hesum fyrilestrunum, sum hildnir verða her, eru rættiliga viðkomandi fyri ein føroying, meðan aðrir eru heldur abstraktir, sigur Ásmundur Guðjónsson.

Hann sigur, at fyrilestrarnir eru rættiliga vísindaligir. Her verður tosað nógv um, hvat hendir við fiski, eftir at hann er veiddur. Tosað verður um saltfisk. Hvussu best fæst burturúr. Hvussu farast skal fram, áðrenn saltað verður og so framvegis.

Nógv verður tosað um kemi á hesi ráðstevnuni, sigur Ásmundur Guðjónsson. Um fysting, bakteriologi og so framvegis.

Dømi um fyrilestrar, hildnir hava verið, eru ein um frysting og upptining av fiski, og hvat hann kann brúkast til aftaná. Hvørjar bakteriur eru í ymiskt viðgjørdum laksi. Og til dømis helt ein týskur granskari fyrilestur um parasittar í kongafiski. So tað fevnir víða, hóast evnið mestsum er tað sama allastaðni kortini.

## Føroyingar ov lítið við

Føroyingar eiga ikki so nógvar granskarar, so føroysku luttakararnir eru vanliga fólk frá fiskiídnaðinum á landi. Men onkur annar er tó við. Eitt nú hitti Sosialurin Kjartan Kristiansen, stjóra á Menningarstovuni, á ráðstevnuni.

Hann metir hetta vera eitt sjáldsamt høvi hjá føroyskum matvørugranskarum at sleppa við inn um í vestureuropeiska matvørugransking.

Ikki tí at vit hava so nógvar granskarar, sigur Kjartan Kristiansen. Men teir, vit hava, eiga at fáa fyrimunir av slíkum ráðstevnum.

Hóast føroyingar ikki hava gjørt tað stóra burtur úr mati, so eru tað onnur sum gera tað.

Vit koyra alt í »stórapott« og kóka ein tíma ella so, og so kann alt etast. Men soleiðis er ikki aðrastaðni. Har eru fólk meira kræsin, sigur Kjartan Kristiansen. Og har verður mangan kelað fyri matinum. Tað verður kannað og gjørt við, og har kemur granskingin inn.

Kjartan Kristiansen harmast um, at granskingarstova okkara, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, er alt ov bundin av øðrum uppgávum, sum eitt nú eftirliti av ymsum slagi, til at hon kann virka sum ein verulig granskingarstova.

Men hann uggar seg við at tekin eru í sól og mána til broytingar á hesum øki.

Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni, er samdur við stjóranum á Føroya Fiskavirking í, at ein slík ráðstevna er eitt ófórt høvi at fáa nýggj sambond. Tað ger tað lættari at samstarva, tá ein kennir persónarnar, sigur hann. Og altjóða samband skal nokk fara at vísa seg at vera til nyttuna, tá tú knappliga ein dag stendur og skalt brúka eitthvørt.




Eitt lágtrýst sunnan fyri Ísland fer eystureftir móti norðara parti av Norðsjónum og haðani í ein landnyrðing.




Brúgvaløgini haðani við regni og vindi koma inn yvir Føroyar. Um vikuskiftið minkar vindurin og tað verður turrari.




**Hitalagið mált frá 19./06. kl 06⁰⁰–20./06. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,9°C**
Minsti hiti máldur í juni: **0,0°** Mesti hiti máldur í juni: **20,0°**




Avfallið: 0,1 mm – **mált frá 19./06. kl 6⁰⁰–20./06. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juni: 36,0 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | – |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 29 |
| Tromsø | 9 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannahavn | 20 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 12 |
| Berlin | 29 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 29 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 23 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 35 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 21 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | – |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 10 |

## Vestfalskyrrindi

**16. juni: Fullmáni**
**18. juni: Mánin longst frá jørðini**
**25. juni: Seinna kvarter**

Kelda: Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði | | Skúvoyar-/Skopunarfirði | | Hestfirði/Sundalagnum | | Vestmannasundi | | Mykinesfirði | | Nólsoyarfirði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/Haraldssundi | | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði | | Hvannasundi | | Fugloyarfirði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp | sp | fp | sp | fp | sp | fp | sp | fp | sp | fp | sp | fp | sp | fp | sp | fp | sp | fp | sp | fp | sp |
| 21. juni | 9.56 | 22.15 | 8.56 | 21.15 | 9.11 | 21.30 | 11.56 | – | 0.38 | 12.56 | 8.11 | 20.30 | 7.11 | 19.30 | 10.11 | 22.30 | 11.11 | 23.30 | 9.41 | 22.00 | 10.56 | 23.15 |
| 22. juni | 10.33 | 22.52 | 9.33 | 21.52 | 9.48 | 22.07 | 0.15 | 12.33 | 1.15 | 13.33 | 8.48 | 21.07 | 7.48 | 20.07 | 10.48 | 23.07 | 11.48 | – | 10.18 | 22.37 | 11.33 | 23.52 |
| 23. juni | 11.13 | 23.34 | 10.13 | 22.34 | 10.28 | 22.49 | 0.52 | 13.13 | 1.52 | 14.13 | 9.28 | 21.49 | 8.28 | 20.49 | 11.28 | 23.49 | 0.07 | 12.28 | 10.58 | 23.19 | – | 12.13 |
| 24. juni | 11.56 | – | 10.56 | 23.23 | 11.11 | 23.38 | 1.34 | 13.56 | 2.34 | 14.56 | 10.11 | 22.38 | 9.11 | 21.38 | – | 12.11 | 0.49 | 13.11 | 11.41 | – | 0.34 | 12.56 |